


**Nr. 19** ***10. septembur 2023*** **83. árg.**

# Bøn fram um alt

*Oddvar Søvik*

Hallesby segði einaferð: „Týdningarmesta arbeiðið, vit gera í Guds ríki, er at biðja, tí bønin er fyritreytin undir øllum øðrum, vit gera.“

Timoteus skal leiða meinigheitina í Efesus, og tað er ein heldur torfør uppgáva. Paulus gevur honum nógv góð ráð í hesum sambandi, men sigur so, at Timoteus fram um alt skal leggja dent á bønina. 1. Tim. 2,1.

Summi halda, at bøn er eitt stríð, men Jesus sigur tað øvugta: „Sanniliga, sanniliga sigi eg tykkum: Hvat tit so biðja faðirin um, tað skal hann geva tykkum í navni mínum. Higartil hava tit einki biðið um í navni mínum. Biðið, og tit skulu fáa **fyri at gleði tykkara kann verða fullkomin**.“ Jóh. 16,23–24. Bøn gevur gleði, og lykilin til bøn er at biðja í Jesu navni. Merkir tað at enda bønina við: „Í Jesu navni. Amen!“ Nei, tað hebraiska orðið her merkir tvey ting: vegna (Jesus) og í samsvari (við Jesus).

Hvussu bað Jesus so? Jesu gerningur byrjaði við bøn. Síðani fór hann 40 dagar út í oyðimørkina, har hann fastaði og bað. Tá ið hann kom aftur, sigur Lukas, at hann kom aftur í **andans kraft**. Luk. 4,14. Arbeiðsdagur Jesusar byrjaði eisini við bøn. Í Jóh. 6,15 stendur, at Jesus fór ofta einsamallur til avsíðis støð at biðja. Markus 1,35 segði, at meðan tað enn var myrkt, fór Jesus upp fyri at biðja. Jesus kundi stytta um náttarsvøvnin, men ikki um morgunbønina. Tá ið Jesus skuldi velja sær teir 12 lærusveinarnar, stendur skrivað, at hann var alla náttina í bøn. Eg haldi, at Jesus ikki fyrst og fremst hugdi eftir, hvussu lærusveinarnir vóru, men eftir hvat ið teir kundu blíva.

Jesus bað eftir Guds vilja. Jóh. 8,28. Hvar hevði hann lært tað? Í bønini, í samrøðuni við Faðir sín. Jesus bað fyri sínum: „Símun, Símun, sí, Satan hevur kraft tykkum, at sálda tykkum sum hveiti. Men eg havi biðið fyri tær, at trúgv tín ikki má tróta.“ Luk. 22,31–32.

Jesus biður eisini fyri okkum. Jóh. 17,20.

*Effie Campbell.*

# Týdningurin av eini biðjandi mammu

*„Biðið, so skal tykkum verða givið; leitið, so skulu tit finna; bankið uppá, so skal verða latið upp fyri tykkum.“ Matt. 7,7.*

Tá ið ein prædikumaður einaferð kom á gátt hjá einari familju í Onglandi og spurdi, um hann kundi koma á tal við mammuna í húsinum, svaraði lítli sonur hennara: „Tú kanst ikki koma á tal við hana beint nú. Hon biður.“

Tað var, av tí at Susanna Wesley brúkti ein tíma hvørja viku at biðja fyri hvørjum av sínum 17 børnum. Seinni brúkti Gud tveir av sonum hennara, John og Charles, at bera eina stóra andaliga veking til Onglands og at seta metodistakirkjuna á stovn. So stóra ávirkan hevur ein biðjandi mamma.

*„... et Ord til Dagen“ - Effie Campbell* umsetti.

# Orð títt er sannleiki

Mitt í einari ørvitisligari og ráðaleysari verð, har serfrøðingar dagliga koma við skiftandi meiningum, eru vit Jesus- og BíblIu-trúgvandi ríkt vælsignað. Í fýra orðum vita vit, hvar sannleikin er. Jesus biður til sín og okkara himmalska Faðir: „ORÐ TÍTT ER SANNLEIKI.“ Jóhs. 17,17.

Tann, sum boyggir seg undir hesi fýra orð, boyggir seg fyri Kristusi, tí Hann er Orðið og Sannleikin.

Ólukkan hjá okkara ættarliði er, at ein stórur partur av fólkinum kennir ikki Sannleikan og leitar heldur ikki eftir honum. Sannleikin er fyri tey flestu, at tað, sum EG haldi vera satt, tað er satt.

Men Jesus skar ígjøgnum allar okkara meiningar og tankar og segði og sigur: „Himmalski Faðir! Títt Orð er Sannleiki.“

*Effie Campbell* umsetti.

# Angist farsóttin

Her tosa vit ikki um óttan fyri t.d. at brenna seg á einari kókiplátu. Tað er ein natúrligur innbygdur ótti, sum skal verja okkum, so vit ikki koma til skaða.

Men tað er ein mótloysis andi til, ein ræðslu andi, sum bindur og lammar. Í 2. Tim. 1,7 stendur: „Tí at ikki gav Gud okkum mótloysis anda, men kraftar og kærleiks og hóvsemis anda.“

Gudsótti er sunnur og neyðugur. Men hin lammandi óttin er ein andi úr myrkursins ríki.

Vit Jesus-trúgvandi hava helst ongantíð havt betri møguleikar gjøgnum lív og orð at vísa og sýna fram Sálm 23,4 mitt í einari truplari tíð, nú korona farsóttin herjar: „Gangi eg í dimmum dølum, einki ilt eg óttist. Tí tú (Hin góði Hirðin) ert við mær, tín stavur og tín keppur, teir ugga meg.“

Tað er í kreppum og ódnum, at vit við Guds náði kunnu vísa heiminum, at tað er trygt at vera ein, sum fylgir Jesusi eftir. Eg óttist einki menniskja, men Gud. Sjálvt um eg gangi í dali deyðaskuggans, óttist eg ikki. Jú meira tíð vit brúka við Jesu føtur, jú minni óttast vit. Tí í hansara fullkomna kærleika verður allur ótti rikin út.

*Effie Campbell* umsetti.

# Er gudsóttin horvin?

Eru tú og eg viðhaldsfólk, sum bara fylgja við hinum, ella eru vit Jesu eftirfylgjarar? Tað er stórur munur har!

Orðið „kristin“ er bara nevnt eina ferð í føroysku Bíbliuni: 1. Pæt. 4,16: „Men um hann líður, av tí at hann er kristin maður, tá skal hann ikki skammast, men heldur prísa Gudi fyri hetta navnið.“ – Men orðið „lærusveinur“ er ofta nevnt, og Jesus sjálvur nevnir tað, tá ið hann gevur okkum hesi boðini í Matt. 28,19–20: „Farið tí og geri øll fólkasløgini til **lærusveinar** mínar, við tað at tit doypa tey til navns faðirsins og sonarins og hins heilaga anda, og við tað at tit **læra tey at halda alt tað, ið eg havi boðið tykkum.** Og sí, eg eri við tykkum allar dagar alt til veraldar enda.“

Vit hoyra ofta fólk siga, at Gud er kærleiki, og tað er hann sanniliga. Men er hann bara kærleiki? Nei, hann er eisini heil-

agur. Mær tykir, at gudsóttin er við at hvørva úr fólki okkara. Einki verður hildið at vera heilagt. Partur av ungdóminum veksur upp og veit ikki, hví vit halda tær ymsu høgtíðirnar.

Vit síggja, hvussu álvarsliga Gud tekur tað, tá ið Ánanias og Saffira lúgva fyri Heilaga Andanum í Áps. 5,1–11. Tá detta tey deyð niður.

Um vit verða háðað, spottað, flent at og kanska forfylgd, av tí at vit vilja liva eitt gudsóttandi lív, so fáa vit styrki gjøgnum uppreisnarkraft Jesusar. Fil. 3,10. Latið okkum liva so nær Jesusi, at vit endurspegla hann.

„Um fólk mítt, sum navn mítt er nevnt yvir, tá bønandi fellur á knæ og søkir ásjón mína og víkur frá vándu vegum sínum, tá vil eg bønhoyra tey á himni og fyrigeva syndir teirra og grøða land teirra.“ 2. Krýn. 7,14.

*Effie Campbell.*

---

Tann, sum fyrstur biður um fyrigeving, er tann djarvasti, tann, sum fyrstur fyrigevur, er hin sterkasti, og tann, sum fyrstur gloymir, er hin eydnusælasti…

*e.c.* ums.

---

Hevur Jesus gripið títt unga hjarta, far so út í víngarðin og brúka arbeiðsdagin fyri tín Harra og Frelsara. Ríkir møguleikar eru so leingi, sum tað eitur í dag. Tú fært kanska eymar føtur ella knø, um tað er bønarteigurin, tú arbeiðir í. Ver vísur í tí, at tú fært løn tína í Himli.

*e.c.* ums.

---

Ein maður hevði verið konu síni ótrúgvur. Hann gjørdi alt fyri at fjala tað. Hví? Tí hann óttaðist meir mannaeyga enn Guds eyga.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 10. sept. | **Tekstur:** | Jóh. 4,5-30 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 4,14a |
| 17. sept. | **Tekstur:** | 1 Mós. 12,1-5; 18,1-15 | **Bíbliuorð:** | Sl. 143,8b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 20** ***24. septembur 2023*** **83. árg.**

# Evangeliið
# – ein lívsumbroytandi kraft

Tey góðu tíðindini um himmiríkið eru bestu tíðindi, sum mannaættin nakrantíð hevur fingið. Í Ápostlasøguni í 8. kapitli lesa vit, at ein stór jagstran og atsókn varð sett í gongd móti teimum kristnu í Jerusalem. Mong noyddust at flýggja, og við teimum spreiddi evangeliið seg sum eldur í turrum hoyggi.

Frá 5. til 8. vers stendur, at „Filippus kom tá oman í bygdina í Sámaria og prædikaði Krist fyri teimum. Og samhugað gav fólkið gætur eftir orðum Filippusar, tá ið tey hoyrdu tey og sóu tey tekin, sum hann gjørdi; tí at tað vóru mong, sum høvdu óreinar andar; teir fóru út úr teimum, rópandi við harðari rødd, og mong lamin og vanfør vórðu lekt. Og har varð stór gleði í teirri bygdini.“ Fólkið í bygdini gav sær far um tað, ið Filippus boðaði, tey tóku ímóti tí og kundu njóta fruktirnar av tí. Og gleðin í bygdini var stór, stendur skrivað. Soleiðis er tað allastaðni, har evangeliið festir røtur. Lívið hjá fólki verður umskapað.

Sagt verður frá, at undir vekingini í Wales, umbroyttist sjálvt lívið hjá hestunum. Alt í einum var tað eingin, sum bannaði og geylaði eftir teimum og gav teimum eina ringa viðferð. Teir stóðu har so bilsnir og skiltu einki.

Ein røð av filmum er gjørd um vekingar ymsa staðni úti í heimi í okkara tíð. Tveir teir fyrstu eita Transformation 1 og 2. Transformation merkir broyting, umskapan. Evangeliið virkar júst á sama hátt í dag sum fyri næstan 2000 árum síðani í Sámaria.

Býurin Almalonga í Guatemala var ein syndakøstur av rúsmisnýtslu, fátækradømi og brotsverkum. Presturin í einum kirkjuliði í býnum varð skotin og dripin. Hetta bar í sær, at tey kristnu komu saman at biðja. Tá breyt vekingin út. Menninir, sum fyrr drukku og fóru illa við sínari familju, blivu nú frelstir. Jarðarbrúk var høvuðsvinnan har á staðnum. Framleiðslan tíggjufaldaðist eftir vekingina, og lívskorini og fíggjarstandurin hjá fólki vaks samsvarandi. Fyrr vóru 36 drykkjustovur og 4 fongsul har, men nú eru tríggjar drykkjustovur og einki fongsul. Gleðin í býnum var stór.

Ein annar filmur er um vekingina á Fijioyggjunum í Kyrrahavinum. So seint sum í 2000 var borgarakríggj har. Hernaðartiltøk og rán vóru gerandiskostur. So breyt vekingin út, sum broytti oyggjarnar fullkomiliga. Uppreistrarleiðararnir blivu frelstir í fongslunum og fingu eitt nýtt lív. Nú savnast fólk á stórum ítróttarvøllum at prísa Jesusi staðin fyri at stjala og drepa. Ja, enntá náttúran er vorðin ávirkað av vekingini. Korallrivini kring oyggjarnar, sum vóru um at doyggja, eru frísk og eru farin at vaksa. Fiskur, sum ikki hevur verið har í langa tíð, leitar nú innaftur til strendurnar.

*„SHALOM“ – Effie Campbell* umsetti.

# Brýtur tú álitið?

*„Sleyivætti ber loyndarmál út, men trúlyntur sakina loynir.“*
*Orðt. 11,13.*

Tað kemur ikki óvart á okkum, tá ið onkur slatrar á vertshúsinum, á hárfríðkanarstovuni ella á arbeiðsplássinum. Men í kirkjuni? Heldur tú, at tað kemur fyri? Trúgv bara umaftur! Tað sæst bara ikki so væl, tí vit duga so væl at fjala út yvir slatrið.

Til dømis: Ein vinur ringir og biður um hjálp, av tí at hjúnalagið ridlar, ella tí at dóttirin hevur trupulleikar av rúsevnum. Tað fyrsta, tú gert, er at ringja til bønarringin, tí „tað skal lutast við hini“.

Gud sigur, at hin rættvísi brýtur ikki álitisviðurskifti. Slatur oyðileggur umdømi og vinaløg. Slatrið fær fólk at lata vera við at biðja um ta hjálp, teimum er tørvur á. Tí flokkar Gud hesa syndina saman við morði. (Sí Róm. 1). Tað ljóðar ógvisligt; men

„Muður býttlingsins er honum ein ólukka, og varrar hans eru fyri sál hans ein snerra. Baktalarans orð eru eins og góðgæti, og tey ganga væl niður í búkin.“ (Orðt. 18,7–8). Gáloysin orð knúsa hjørtu!

Hví er Gud so harður mótvegis slatri? Tí at slatrið gevur heiminum tað signalið, at tú kanst ikki líta á Guds meinigheit. Nakrir av størstu syndarunum eru kirkjuleiðarar við leysum tungum, sum royna at vekja undran hjá øðrum við at avdúka, hvussu menniskju stríðast. Vit áttu at skammast! Okkum er tørvur á at biðja: „Orðini av munni mínum veri tær til vildar; mín hjartans hugsan komi tær fyri ásjón! Harri, klettur mín, loysnari mín!“ (Sálmur 19,15). Dugir tú at dylja loyndarmálini hjá øðrum? Prógva tað so!

*„... et Ord til Dagen“ – Effie Campbell* umsetti.

# At vera ein kristin er:

*at líta á tað, sum Kristus sigur,*
*at taka ímóti tí, sum Kristus gevur,*
*og at gera tað, sum Kristus vil.*

*e.c.* ums.

# Skeivar upplýsingar

Myrkrið legði seg so líðandi yvir landslagið, tá ið hitt stóra tokið við miklari ferð førdi ferðafólkini burtur frá býnum New York. Ljósini frá høvuðsstaðnum hvurvu so við og við. Brádliga sá tokstjórin okkurt fyri framman, sum ikki átti at verið har. Við einum ræðuligum gangi rendu hesi bæði tokini inn í hvørt annað, og 50 fólk doyðu. Annar tokstjórin, sum varð kroystur inn ímillum maskinuna, vísti bjargingarmanni sínum eitt pappír og segði: „Tak hetta, tað skal verða prógvið hjá myndugleikunum, so at teir síggja, at onkur hevur givið mær skeivar upplýsingar.“ Tað vóru síðstu orð hansara.

Á, tann sorgarleikur. Á, tær óneyðugu líðingar, á, tann stóri missur. Og kortini endurtekur hitt sama seg dag um dag. Av skeivum upplýsingum enda menniskju í túsundatali í ævigari glatan, vónloysi og ólukku.

Tað er sagt teimum, at tey koma í himmalin, bara tey liva eitt skikkiligt lív. Men soleiðis er tað ikki, hetta eru „skeivar upplýsingar“.

Onnur halda, at Gud lønar teimum, bara tey ganga í kirkju ella á møti og av og á leggja nakrar krónur í talvuna. Men tað er heldur ikki satt.

Og tað eru óivað nøkur, sum halda, at Gud fer at taka ímóti øllum, sum gerast pínslarváttar fyri onkrari góðari søk. Men tað er heldur ikki nóg mikið, eisini hetta eru „skeivar upplýsingar“.

Hvat eru so tær røttu upplýsingarnar? Hvussu fáa menniskju lut í tí æviga lívinum? Tað kunnu tey bert við at trúgva, at Jesus Kristus er Guds sonur og at geva honum loyvi at ráða í hjarta teirra.

Einki menniskja á jørð kann gera Guds heilaga hjarta nøgt við at ofra seg sjálvan ella við at geva ríkidømi sítt burtur. Men Jesus Kristus, sonur Guds, hevur longu gjørt Gud nøgdan, tá ið hann doyði á Golgata krossi fyri okkum.

Tað er tí, at vit gleðast um tað, Paulus skrivar í brævi sínum til Titus: „Men tá ið góðska og mannakærleiki Guds, frelsara várs, vórðu opinberað, frelsti hann okkum, ikki fyri rættferðar gerninganna skuld, sum vit høvdu gjørt, men av miskunn síni, við baði endurføðingar og endurnýggjanar í heilagum anda, sum hann ríkliga úthelti yvir okkum við Jesusi Kristi, frelsara várum, fyri at vit, rættvísgjørdir við náði hansara, skuldu í vón verða arvingar til ævigt lív.“ Tit. 3,4–7.

Tá ið vit játta, at vit eru syndarar, og trúgva, at Kristus kom fyri at doyggja í okkara stað, fáa vit tað æviga lívið sum gávu, og Gud gevur okkum sín frið í hjørtu okkara.

Hetta eru tær „røttu upplýsingarnar“. Latið okkum fylgja teimum og liva.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Ver ikki bangin fyri morgindegnum! Gud er longu har!

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 24. sept | **Tekstur:** | 1 Mós. 21,1-5; 22,1-19 | **Bíbliuorð:** | Ják. 2, 23 |
| 1. okt. | **Tekstur:** | 1 Mós. 24,1-67 | **Bíbliuorð:** | Matt. 7,7 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74